Koppseting
COVID-19

# Koppseting fyri COVID-19

## Støðulýsing 4




COVID-19 koppsetingarbólkurin
24. juni 2021

# Hálvur teinur rógvin – eitt flott avrik

Tað er altíð ein góð kensla, tá eitt møtimikið arbeiði er komið hálva leið. Tá hálvur teinur er rógvin, gerst tað hugaligari, og ein fær eyka styrki, tí nú hómast málið. Ert tú á fjøllunum, er ferðin niðan á ofta tung og drúgv, men síðan er undanbrekka.

Sum landsstýrismaður í heilsumálum, er tað sanniliga eisini hugaligt at vita sær, at nú er helvtin av føroyska fólkinum koppsett einaferð fyri koronu.

Fyri meg sum borgara er tað eisini sera gleðiligt at vita sær, at føroyska heilsuverkið stórt sæð hevur koyrt sum ein væl smurd maskina, síðani vit fyrstu lærdu at siga nýggju orðini korona og COVID-19.

Vit teljast ímillum tey fremstu í heimshøpi, tá tað ræður um smittuuppsporing, -avbyrging og -fyribyrging. Fleiri ferðir hevur smittan roynt at fingið fastatøkur her heima, men hvørja ferð hava vit fótað okkum og fingið tamarhald á støðuni aftur.

Føroyingar eru tó eisini vorðnir sjúkir av koronu, men samanborið við onnur lond eru vit við fáum undantøkum sloppin ómetaliga væl eisini í so máta.

Alt hetta vekir av sonnum eina trygdargóða kenslu.

Nú eru vit so komin í helvt við fyrstu koppsetingini, og í hølunum á henni kemur annað prikið.

Eisini við koppsetingini hevur gongdin í Føroyum verið fyrimyndarlig. Vit fáa uml. 7 skamtar úr hvørjum glasi við koppingarevni, og hjá okkum fer, so at siga, eingin skamtur til spillis.

Men góða gongdin kemur ikki av ongum. Føroya fólk hevur staðið saman og sýnt samhaldsfesti og sínamillum ábyrgd í hesi farsóttartíðini. Tað er fyrsta fortreytin fyri, at so stór heilsuátøk fyri alt fólkið kunnu eydnast.

Sjúkrahúsverkið og alt heilsuverkið annars við sínum starvsfólkum, Heilsufrøðiliga Starvsstovan, alt umsorganarøkið, privatar fyritøkur og onnur, ið á ein ella annan hátt hava havt sín lut í stríðnum ímóti farsóttini, hava verið kvik í ráðum og hava við hegni og dugnasemi lagt ætlanir og síðani loyst sínar uppgávur til lítar.

Tit skulu øll hava stóra takk fyri tað.

Ein serlig og innilig tøkk skal ljóða til tykkum framúr dugnaligu og djørvu heilsustarvsfólk í fremstu røð, sum hava sýnt bæði áræði og offurvilja langt út um tað vanliga.

Uttan tykkum øll høvdu vit verri enn so megnað hesa avbjóðingina so væl..

**Kaj Leo Holm Johannesen**
*landsstýrismaður í heilsumálum*

# Innihaldsyvirlit

Samandráttur . . . . . . . . . . 4

Koppsett higartil . . . . . . . . . . 5

Meting um koppsetingargongdina . . . . . . . . . . 8

Koppsetingarkalendarin . . . . . . . . . . 9

Bókingarskipan til koppseting . . . . . . . . . . 10

Koppsetingartoymið í Sjúkrahúsverkinum og Apoteksverkinum . . . . . . . . . . 11

Koppingarevnir og vørusendingar . . . . . . . . . . 14

Koppseta fólk, sum fyribils eru stødd í Føroyum og í Danmark . . . . . . . . . . 17

Soleiðis virkar flokkimmunitetur . . . . . . . . . . 18

Eitt talgilt koronupass . . . . . . . . . . 19

Hjáárin í sambandi við koppseting . . . . . . . . . . 20

Føroyar samanborið við onnur lond . . . . . . . . . . 21

Kunningartilfar . . . . . . . . . . 22

Kunngerð um COVID-19 koppseting . . . . . . . . . . 23

# Samandráttur

Í hesi støðulýsingini verður tikið samanum koppsetingargongdina higartil, og løgd verða fram hagtøl, sum lýsa gongdina í tíðarskeiðinum frá 30. desember 2020 til 23. juni 2021. Hetta er fjórða støðulýsingin frá COVID-19 koppsetingarbólkinum.

Tann 24. juni 2021 høvdu 50,4% av øllum føroyingum fingið 1. koppsetingina fyri COVID-19. Hetta er ein týðandi varði á leiðini at basa hesi herviligu farsótt. Samstundis hava 34,9% av føroyingum fingið 2. koppsetingina og eru sostatt liðugt koppsettir.

Í Føroyum varð farið undir at koppseta fyri COVID-19 tann 30. desember 2020. Tann 23. juni vórðu tilsamans 45.456 koppsetingar framdar, av hesum hava 26.874 fólk fingið fyrru koppsetingina og 18.852 fólk hava fingið seinnu koppsetingina.

Koppsetingin er komin væl áleiðis. Byrjað varð við at koppseta starvsfólk innan heilsu-, eldra- og almannaøkið. Síðani varð farið undir at koppseta fólk í serligum vandabólkum. Eftir hetta varð farið undir at koppseta fólk eftir aldri, og byrjað var við teimum elstu. Í juni var tilboðið um koppseting víðkað til tann seinasta aldursbólkin, sum eru tey, ið hava fylt 16 ár.

Samanumtikið hevur tað gingið sera væl við koppsetingini í Føroyum. Koppsetingin hevur gingið skjótt, og gagnnýtslan av koppingarevni hevur verið høg. Hetta hevur havt við sær, at tað hevur borið til at fáa uml. 15% meiri koppingarevni, enn roknað var við. Samanlagt merkir tað, at Sjúkrahúsverkið hevur gjørt uml. 5.000 koppsetingar fleiri enn væntað var, við teimum nøgdum av koppingarevnum, sum eru komin til Føroyar.

Í øðrum ársfjórðingi hava veitingarnar av koppingarevni frá PfizerBioNTech verið munandi størri enn áður, hetta hevur eisini havt við sær, at meira ferð nú er komin á koppsetingina.

Í løtuni er tó trupult at siga, nær øll í Føroyum, sum koppingarevni er góðkent til, hava fingið í boðið koppsetingina. Orsøkin er, at hetta er tengt at, hvussu nógv koppingarevni koma til Føroyar. Sum støðan er nú, verður roknað við, at øll, sum ynskja tað, eru liðugt koppsett um miðjan september 2021. Hetta samsvarar eisini við donsku tíðarætlanina fyri koppsetingum.

Góða gongdin við koppsetingum hevur við sær, at vit í Føroyum nærkast málinum um flokkimmunitet. Tað er sera umráðandi at røkka hesum máli, tí við flokkimmuniteti verður fjøldin vard.

Síðani farið var undir at koppseta hevur COVID-19 koppsetingarbólkurin fylgt gongdini neyvt, og gjørdar eru tillagingar, tá tørvur hevur verið á tí.

# Koppsett higartil

Fyrstu føroyingarnir vórðu koppsettir beint fyri nýggjár, tann 30. desember 2020, og tann 23. juni 2021 vóru tilsamans 45.456 koppsetingar givnar í Føroyum. Í alt 26.874 fólk, svarandi til 50,4 prosent, hava fingið fyrru koppsetingina og 18.852 fólk hava fingið seinnu koppsetingina, og eru sostatt liðugt koppsett. Hetta svarar til 34,9% prosent av fólkatalinum.

**Fyrra prik**

**26.874** fólk

**50,4%** av fólkatalinum

**Seinna prik**

**18.582** fólk

**34,9%** av fólkatalinum

Tann fyrsti føroyingurin, sum varð koppsettur fyri COVID-19, er Gunnrið Joensen. Myndirnar eru tiknar í sambandi við koppsetingina. Á myndunum eru Gunnrið Joensen, sjúkrarøktarfrøðingur, Tummas í Garði, varastjóri og Kaj Leo Holm Johannesen, landsstýrismaður í heilsumálum.





Tey fyrstu, sum fingið tilboð um koppseting, vóru starvsfólk í heilsugeiranum, eldrageiranum og ávísum pørtum av almannageiranum, sum hava tætt samband við sjúklingar ella búfólk, og sum eru í serligum vanda fyri at verða smittað við COVID-19. Tá hesi vóru koppsett, fingu aðrir bólkar tilboð um at verða koppsettir. Henda raðfesting sæst eisini aftur í kynsbýtinum. Fyrstu vikurnar vóru tað munandi fleiri kvinnur enn menn, sum vóru koppsettar. Hetta kemst av, at tað eru fleiri kvinnur enn menn í hesum starvsbólkum. Tá tilboðið um koppseting varð víðkað til at fevna um fleiri bólkar, vóru fleiri menn koppsettir.

Síðan farið varð at koppseta eftir aldri í viku 12, sæst eisini eitt javnari kynsbýti millum tey, ið taka av tilboðnum um koppseting fyri COVID-19. Samlaða býtið sæst á myndini niðanfyri.

**Tal av koppsetingum hvørja viku**

Seinast uppgjørt: 23.06.2021




*Á myndini sæst, hvussu nógv hava fingið ávikavist fyrra og seinna prik, síðani farið var undir at koppseta tann 30. desember 2020.*

**Kynsbýti yvir tíð**

Seinast uppgjørt: 23.06.2021




**Koppsetingar skift á kyn**






Koppseting COVID-19

Tá hugt verður eftir, hvussu nógv eru koppsett í teimum ymsu aldursbólkunum, sæst, at flestu teirra, sum eru koppsett, eru fólk, sum eru 55 ár og eldri. Í koppsetingartilgongdini hevur verið koppsett eftir aldri, og tá øll, 45 ár og eldri, høvdu fingið tilboð um koppseting, varð tilboðið um koppseting víðkað til eisini at fevna um tey í aldrinum 16-44 ár. Sostatt stendur øllum, sum hava fylt 16 ár, í boði at verða koppsett fyri COVID-19. Henda raðfesting endurspeglast eisini í myndunum niðanfyri.

### Aldursbýtið á teimum koppsettu




Í myndini niðanfyri sæst, at flestu teirra, sum eru koppsett, eru í aldursbólkinum, sum hevur fylt 55 ár. Men tað eru framvegis fleiri í teimum elstu aldursbólkunum, sum ikki eru liðugt koppsett. Sjúkrahúsverkið arbeiðir við at kanna, hvørjar møguligar orsøkir kunnu vera til, at fólk ikki eru liðugt koppsett. Tá greiða er fingin á hesum, verður støða tikin til, hvørji stig kunnu takast, so enn fleiri av teimum í eldru aldursbólkunum fara at taka av tilboðnum um koppseting.

### Koppsett í mun til fólkatal í aldursbólkum

| | Fólkatal | Fyrra prik | Í prosentum | Liðugt koppsett | Í prosentum |
|---|---|---|---|---|---|
| 15-24 ár | 6865 | 2063 | 30% | 311 | 5% |
| 25-34 ár | 6476 | 2006 | 31% | 601 | 9% |
| 35-34 ár | 6353 | 2559 | 40% | 862 | 14% |
| 45-54 ár | 6772 | 5295 | 78% | 1430 | 21% |
| 55-64 ár | 6409 | 5441 | 85% | 3857 | 60% |
| 65-74 ár | 5161 | 4599 | 89% | 4049 | 78% |
| 75-84 ár | 3067 | 2758 | 90% | 2555 | 83% |
| 85 ár o.e. | 1210 | 1071 | 89% | 1027 | 85% |

### Aldursbólkurin 12-15 ár og koppseting

Sundhedsstyrelsen hevur boðað frá, at Danmark fer at víðka tilboðið um ókeypis koppseting fyri COVID-19, so hetta tilboð eisini fer at fevna um tey, sum eru í aldursbólkinum 12-15 ár. Sundhedsstyrelsen roknar við, at farið verður undir at koppseta hesi um miðjan september 2021, tá tey eru liðug at koppseta tey, sum hava fylt 16 ár. Í Føroyum er støða ikki tikin til, um tey í aldursbólkinum 12-15 ár skulu fáa tilboð um koppseting fyri COVID-19. Koppsetingarbólkurin viðgerð í løtuni henda spurningin.

# Koppsetingarkalendarin og meting um koppsetingargongdina

Í koppsetingarkalendaranum sæst, nær teir ymsu málbólkarnir fáa tilboð um koppseting, og nær roknað verður við, at málbólkarnir eru liðugt koppsettir.

Í koppsetingarkalendaranum vóru fólk upprunaliga býtt upp í 12 málbólkar. Tá tey, sum eru í málbólkunum 1-9 vóru liðugt koppsett, helt koppsetingarbólkurin, við atliti til koppsetingargongdina, at tað var skynsamast at leggja málbólkarnar 10-12 saman í ein málbólk, sum so bleiv tann nýggi málbólkur 10. Øll, sum eru í málbólkunum 1-10, hava nú fingið tilboð um koppseting.

Grundarlagið fyri tíðarætlanini í koppsetingarkalendaranum eru tær fráboðanir og metingar, sum heilivágsfyritøkurnar koma við um tal á skamtum og vørusendingum, sum tær lata til Evropa, og herundir til Danmarkar og Føroyar. Síðani farið var undir at koppseta, hava heilivágsfyritøkurnar havt ymsar fráboðanir um, hvussu nógvar skamtar tær kunnu framleiða bæði í løtuni og sum frálíður. Hetta hevur havt við sær, at koppsetingarkalendarin er dagførdur nakrar ferðir, síðani farið varð undir at koppseta. Í løtuni vísa framrokningar, at í fyrru helvt av september 2021 eru øll í Føroyum koppsett, sum ynskja tað. Eftirsum Føroyar fáa burturav sendingunum við koppingarevnum, sum koma til Danmarkar, líkist føroyska tíðarætlan fyri koppsetingunum ti donsku.

Við støði í væntaðu veitingum av koppingarevni, er ein meting gjørd um koppsetingargongdina frameftir. Grundarlagið í metingini er, at umleið 84.000 koppsetingar skulu fremjast. Hetta eru øll 16 ár og eldri, búsitandi í Føroyum, undantikið barna- og bróstakonur. Harafturat koma útisetar og útlendingar, sum uppihalda sær í Føroyum í longri tíðarskeið.

Myndin niðanfyri vísir, at um hálvan juli eru 50% av koppsetingunum framdar, og fyrstu vikuna í august eru 80% av koppsetingunum framdar. Eftir fyrstu vikuna í september, eru øll 16 ár og eldri, sum ynskja tað, koppsett.

**Meting um koppsetingargongdina**



# Koppsetingarkalendari

Við støði í fráboðan frá Sundhedsstyrelsen um væntaðar veitingar av koppingarevni, rokna vit við, at koppsetingin fer fram eftir hesi tiðarætlan.




*Tølini eru bygd á metingar og skulu takast við fyrivarni. Gáa eisini eftir, at ein kann hoyra til meira enn ein av nevndu bólkum.*

# Bókingarskipan til koppseting

Upprunaliga var ætlanin at hava eina talgilda bókingarskipan tøka, tá farið varð undir at koppseta. Men av tí, at skotbráðið var so stutt frá tí, at koppsetingarætlanin varð handað landsstýrismanninum tann 16. desember 2020 til farast kundi undir at koppseta fyrstu føroyingarnar tann 30. desember 2020, vóru ikki stundir at menna eina slíka skipan. Av tí, at eingin talgild skipan var tøk hesa fyrstu tíðina, varð gjørt av, at fólk í teimum málbólkum, ið vóru fevndir av tilboðnum um koppseting, skuldu skriva seg upp á listar, sum síðani vóru latnir Sjúkrahúsverkinum, eftirsum Sjúkrahúsverkið stóð fyri at kalla inn og koppseta fólk.

Samstundis sum farið varð undir at koppseta, varð farið undir at menna eina talgilda bókingarskipan. Tey fyrstu at royna hesa nýggju bókingarskipanina vóru fólk í málbólki 6, t.v.s. fólk, sum hava fylt 85 ár. Skipanin virkar soleiðis, at tey, ið eiga tørn sambært koppsetingarætlanini, fáa boð gjøgnum miðlarnar um, at tey kunnu bíleggja sær tíð til koppseting. Bíleggingin fer fram á www.korona.fo. Á hesi síðuni kunnu fólk velja nær og hvar, tey ynskja at verða koppsett. T.v.s. at tey velja á hvørjum sjúkrahúsi koppsetingin fer fram umframt dato og klokkutíð. Tey, sum ikki hava møguleika at bíleggja sær tíð á heimasíðuni ella at fáa hjálp frá avvarðandi, kunnu ringja á telefon 304545 og fáa hjálp.

Skipanin við bókingum er gjørd soleiðis, at fyrsta dagin, latið verður upp fyri at bíleggja tíð til koppseting í tí einstaka aldursbólkinum, fáa tey í serligum vandabólkum framíhjárætt at bíleggja sær tíð. Eftir tann dagin kunnu øll, sum hoyra til aldursbólkin, bíleggja sær tíð á jøvnum føti.



# Koppsetingartoymið í Sjúkrahúsverkinum og Apoteksverkinum

Sjúkrahúsverkið hevur sett eitt koppsetingartoymi við starvsfólkum frá teimum trimum sjúkrahúsunum, og øll koppsetingin er samskipað við eins mannagongdum tvørtur um sjúkrahúsini. So hvørt boð koma frá Landsapotekaranum um, at ein sending við koppingarevni er á veg, fáa fólk í teimum raðfestu málbólkunum bjóðað koppseting. Nógv flest fólk eru koppsett inni á teimum trimum sjúkrahúsunum, og harumframt hava flytførar eindir frá sjúkrahúsunum vitjað á ellis- og røktarheimum og sambýlum kring landið fyri at koppseta búfólk.

Apoteksverkið hevur eisini skipað eitt koppsetingartoymi, sum tekur sær av øllum tí praktiska við at fáa koppingarevni til Føroyar og síðani út til tey trý sjúkrahúsini.










0.1
0.2
0.4
0.5
0.6
0.7





# Covid-19 vaccinatión

Landssjúkrahúsið

Dagur: Leygardag
Slag av vaccinu: PFIZER

Dato: 5/6 - 2021
Batchnummar: FC 2336

| Nr | Antal vaccinur | Nr | Antal vaccinur | Nr | Antal vaccinur | Nr | Antal vaccinur | Nr | Antal vaccinur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | 7 | 36 | 7 | 71 | 7 | 106 | 7 | 141 | 7 |
| 2 | 7 | 37 | 7 | 72 | 7 | 107 | 7 | 142 | |
| 3 | 7 | 38 | 7 | 73 | 7 | 108 | 7 | 143 | |
| 4 | 7 | 39 | 7 | 74 | 7 | 109 | 7 | 144 | |
| 5 | 7 | 40 | 7 | 75 | 7 | 110 | 7 | 145 | |
| 6 | 7 | 41 | 7 | 76 | 7 | 111 | 7 | 146 | |
| 7 | 7 | 42 | 7 | 77 | 7 | 112 | 7 | 147 | |
| 8 | 7 | 43 | 7 | 78 | 7 | 113 | 7 | 148 | |
| 9 | 7 | 44 | 7 | 79 | 7 | 114 | 7 | 149 | |
| 10 | 7 | 45 | 7 | 80 | 7 | 115 | 7 | 150 | |
| 11 | 7 | 46 | 7 | 81 | 7 | 116 | 7 | 151 | |
| 12 | 7 | 47 | 7 | 82 | 7 | 117 | 7 | 152 | |
| 13 | 7 | 48 | 7 | 83 | 7 | 118 | 7 | 153 | |
| 14 | 7 | 49 | 7 | 84 | 7 | 119 | 7 | 154 | |
| 15 | 7 | 50 | 7 | 85 | 7 | 120 | 7 | 155 | |
| 16 | 7 | 51 | 7 | 86 | 7 | 121 | 7 | 156 | |
| 17 | 7 | 52 | 7 | 87 | 7 | 122 | 7 | 157 | |
| 18 | 7 | 53 | 7 | 88 | 7 | 123 | 7 | 158 | |
| 19 | 7 | 54 | 7 | 89 | 7 | 124 | 7 | 159 | |
| 20 | 7 | 55 | 7 | 90 | 7 | 125 | 7 | 160 | |
| 21 | 7 | 56 | 7 | 91 | 7 | 126 | 7 | 161 | |
| 22 | 7 | 57 | 7 | 92 | 7 | 127 | 7 | 162 | |
| 23 | 7 | 58 | 7 | 93 | 7 | 128 | 7 | 163 | |
| 24 | 7 | 59 | 7 | 94 | 7 | 129 | 7 | 164 | |
| 25 | 7 | 60 | 7 | 95 | 7 | 130 | 7 | 165 | |
| 26 | 7 | 61 | 7 | 96 | 7 | 131 | 7 | 166 | |
| 27 | 7 | 62 | 7 | 97 | 7 | 132 | 7 | 167 | |
| 28 | 7 | 63 | 7 | 98 | 7 | 133 | 7 | 168 | |
| 29 | 7 | 64 | 7 | 99 | 7 | 134 | 7 | 169 | |
| 30 | 7 | 65 | 7 | 100 | 7 | 135 | 7 | 170 | |
| 31 | 7 | 66 | 7 | 101 | 7 | 136 | 7 | 171 | |
| 32 | 7 | 67 | 7 | 102 | 7 | 137 | 7 | 172 | |
| 33 | 7 | 68 | 7 | 103 | 7 | 138 | 7 | 173 | |
| 34 | 7 | 69 | 7 | 104 | 7 | 139 | 7 | 174 | |
| 35 | 7 | 70 | 7 | 105 | 7 | 140 | 7 | 175 | |

Antal spill[1]: 1
Antal vaccinur givnar tilsamans: 986

1) Vaccina, sum er trekt upp, men ikki givin (til dømis tí blóð er aspirerað, mist á gólv ella líknandi)






# Koppingarevnir og vørusendingar

**Koppingarevnir fevnd av koppingarætlanini**
Føroyar fáa koppingarevnir úr Danmark. í Danmark eru tvey sløg av koppingarevnum fevnd av koppseting-arætlanini. Á heimasíðunum hjá Sundhedsstyrelsen (www.sst.dk) og Lægemiddelstyrelsen (www.lmst.dk) ber til at lesa meira um koppingarevnini, og hvussu tey verða góðkend at brúka til koppsetingar.

| | | |
|---|---|---|
| **Comirnaty®**<br><br>Tøkni | Týska fyritøkan BioNTech hevur ment hetta koppingarevnið, sum verður framleitt og marknaðarført í samstarvi við amerikonsku fyritøkuna Pfizer. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt og sent frá Pfizer í Belgia. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 21 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 42 dagar.<br><br>Messenger RNA (mRNA) | **Góðkent 21.12.2020**<br><br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 26.12.2020.<br><br>Fyrsta vørusendingin kom til Føroyar 27.12.2020. |
| **COVID-19 Vaccine Moderna®**<br><br>Tøkni | Amerikanska fyritøkan Moderna hevur ment koppingarevnið saman við US National Institute of Allergy and Infectious Diseases. Koppingarevnið til marknaðin í Evropa verður framleitt í Sveis og Spania eftir avtalu við sveisisku fyritøkuna Lonza Group. Koppingarevnið verður veitt tvær ferðir við 28 daga millumbili og í undantaksførum innan fyri 43 dagar.<br><br>Messenger RNA (mRNA) | **Góðkent 6.01.2021**<br><br>Fyrsta vørusending kom til Statens Serum Institut 12.01.2021.<br><br>Hetta koppingarevnið verður ikki brúkt í Føroyum. |

Koppingarevnið, sum verður brúkt í Føroyum, kemur frá PfizerBioNTech. Upprunaliga var ætlanin, at tey ymsu sløgini av koppingarevni, sum koma til Danmarkar, skuldu býtast millum Føroyar, Grønland og Danmark. Men stutt eftir, at londini vóru farin undir at koppseta, boðaði Grønland frá, at tað var sera avbjóðandi hjá teimum at brúka koppingarevnið frá PfizerBioNTech, tí hetta koppingarevnið er sera viðbrekið at handfara. Sum ein avleiðing av hesum gjørdu Føroyar og Grønland av at gera eina aðra skipan, sum hevur við sær, at Føroyar fær koppingarevnið frá PfizerBioNTech (eisini partin, sum var ætlaður Grønlandi); og Grønland fær koppingarevnið frá Moderna (eisini partin, sum var ætlaður Føroyum). Henda skipanin hevur roynst sera væl, síðani hon var sett í verk.

**Vørusendingar**
Koppingarevnini, sum Danmark fær, verða latin Statens Serum Institut, sum síðani sendur tey til ávikavist Føroyar, Grønlands og donsku regiónirnar. Tá koppingarevnini koma til Føroyar, verða tey latin Apoteksverkinum, sum hevur tey í varðveitslu, til tey verða brúkt at koppseta fólk í Føroyum.

Apoteksverkið fær hvørja viku eina fráboðan um, hvussu nógv koppingarevni fara at koma til Føroyar komandi tvær vikurnar. Tað er trupult hjá Sjúkrahúsverkinum at leggja koppsetingarnar til rættis yvir tíð, tá tað bert ber til at fáa at vita, hvørjar vørusendingarnar verða komandi tvær vikurnar.

Í mynd niðanfyri sæst, hvussu nógv koppingarevni Føroyar hava fingið/fara at fáa í tíðarskeiðinum desember 2020 – juni (higartil) 2021.

*Vørusendingar við koppingarevninum Comirnaty®*

| | **Desember** | **Januar** | **Februar** | **Mars** | **Apríl** | **Mai** | **Juni** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Tal á bakkum | 1 | 2 | 3 | 5 | 4 | 10 | 15 |
| Skamtar* | 1.365 | 2.730 | 4.095 | 6.825 | 5.460 | 13.650 | 20.475 |

** Tal á skamtum um 7 skamtar fáast úr hvørjum glasi.*

Danmark fekk upprunaliga koppingarevni frá PfizerBioNTech, Moderna, AstraZeneca og Johnson&Johnson. Men á vári 2021 gjørdi danska Sundhedsstyrelsen av at steðga við at brúka koppingarevni frá AstraZeneca og Johnson&Johnsen. Avgerðin hjá Sundhedsstyrelsen hevur við sær, at talið á skamtum, sum koma til Danmarkar, er lækkað. Av tí, at skamtirnir verða býttir millum londini eftir fólkatalið, ávirkar hetta eisini talið á skamtum, sum verða sendir til Føroyar og Grønlands.

**Gagnnýtsla – Framvegis sera góð handfaring av koppingarevninum**

Tað hevur verið eitt mál frá byrjan, at einki koppingarevni skuldi fara fyri skeytið. Í einari tíð, har allur heimurin hevur tørv á koppingarevni, og nøgdirnar ikki standa mát við eftirspurninginum, er avgerandi, at gagnnýtslan verður so høg sum gjørligt.

Sum greitt frá í undanfarnu støðulýsingum, hevur tað eydnast koppsetingartoymunum konsekvent at fáa lutfalsliga nógvar skamtar úr hvørjum hettuglasi, samstundis sum lagt hevur verið til rættis á slíkan hátt, at so at siga einki koppingarevni er farið burtur. Hendilig óhapp, so sum at bróta hettugløs í sambandi við flutning, hava eisini verið sera fá.

Í Føroyum hava vit koppsett við koppingarevninum Comirnaty frá PfizerBioNTech. Danska Sundhedsstyrelsen metir, at í hvørjum hettuglasi eru seks skamtar á 0,3 ml. Fyrstu tíðina varð mett, at tað vóru fimm skamtar í hvørjum hettuglasi, sum framleiðarin eisini hevði boðað frá. Okkara royndir siga tó, at tey, ið standa fyri koppsetingini, mest sum hvørja ferð fáa 7 skamtar úr hvørjum hettuglasi.

Hin 15. juni 2021 vórðu tey síðstu hettugløsini í bakka nummar 30 av koppingarevninum PfizerBioNTech tømd. Tá varð prik nummar 40.484 givið í Føroyum. Tað svarar til, at vit í miðal hava fingið 6,92 skamtar úr hvørjum hettuglasi ella gott 15 prosent meira koppingarevni, enn mett er. Samanlagt svarar tað til, at Sjúkrahúsverkið hevur gjørt 5.000 koppsetingar fleiri, enn væntað varð, við teimum nøgdum av koppingarevni, sum komnar eru til landið.

**Avlopsskamtir**

Áðrenn farið var undir at koppseta, var tað hildið at vera sera týdningarmikið at hava eina kunngerð, sum neyvt ásetti, hvør kundi koppsetast. Orsøkin var avmarkaðu nøgdirnar av koppingarevnum. Seinni hevur tað víst seg, at henda skipanin var ov stirvin, tí hon tók ikki atlit til, hvat skuldi gerast við møguligar avlopsskamtar. T.v.s. kundu teir brúkast ella skuldu teir koyrast burtur. Gjørt varð av at brúka avlopsskamtarnar, heldur enn at burturbeina skamtarnar. Av somu orsøk eru eingir skamtar burturbeindir; men mikil orrusta stóðst av avgerðini. Kunngerðin varð síðani broytt, so Sjúkrahúsverkið kundi koppseta onnur enn tey, sum eru nevnd í kunngerðini, um so er, at skamtur loypur av tann dag koppsett verður. Sjúkrahúsverkið gjørdi

eina leiðreglu um at koppseta við avlopsskamtum. Í sambandi við, at tilboðið um koppseting varð víðkað til eisini at fevna um persónar í aldrinum 16–44 ár, varð skipanin við avlopsskamtum tikin av, tí nú er ikki tørvur á henni longur.

**Hvussu long tíð skal ella kann verða ímillum prikini?**
Spurningurin um, hvussu long tíð antin kann ella skal verða ímillum prikini verður oftað settur. Almennu leiðreglurnar í Føroyum eru 3 til 6 vikur millum fyrstu og aðru koppseting við koppingarevninum Comirnaty frá PfizerBioNtech – hetta er sambært tilmæli frá tí, sum framleiðir koppingarevnið, og soleiðis sum EMA (Evopeiski heilivágsstovnurin) hevur góðkent koppingarevnið. Danmark fylgir eisini hesum tilmæli.

Hóast tað, vita vit at í t.d. Bretlandi og Noregi eru upp í 12 vikur ímillum fyrstu og aðru koppseting við koppingarevninum Comirnaty. Í Bretlandi hava tey, síðan koppingartilgongdin byrjaði, havt 12 vikur ímillum koppsetingarnar, og ein bretsk kanning gevur ábendingar um, at fólk fáa fleiri andevni móti COVID-19, tá tað eru longri enn 6 vikur ímillum fyrstu og aðru koppseting.

Tað vil siga, at leiðreglurnar í Føroyum eru framvegis 3-6 vikur ímillum koppsetingarnar. Men fyrsta koppsetingin fer ikki fyri skjeytið, um tað ganga longri enn 6 vikur millum fyrstu og aðru koppseting.





# Koppseta fólk, sum fyribils eru stødd í Føroyum og í Danmark

Tilboðið um ókeypis koppseting fyri COVID-19 er víðkað bæði í Føroyum og í Danmark til eisini at fevna um fólk, sum fyribils uppihalda sær í landinum í longri tíðarskeið, tvs. í minsta lagi í 30 dagar.

**Koppseta fólk, sum fyribils eru stødd í Føroyum**
Tá tað snýr seg um tilboðið um ókeypis koppseting, hevur tað higartil verið soleiðis, at tilboðið bert verður veitt persónum, ið eru búsitiandi í Føroyum. Men av tí, at støðan við COVID-19 er so serstøk, er eitt undantak gjørt hesum viðvíkjandi. Hetta merkir, at føroyingar og onnur, ið eru búsitiandi uttanlands, men sum eru stødd í Føroyum í longri tíð, kunnu verða koppsett í Føroyum. Roknað verður við, at tað serliga eru fólk undir útbúgving, sum fáa gleði av hesari broytingini. Treytin fyri, at hesi kunnu verða koppsett ókeypis fyri COVID-19 er, at tey eru í Føroyum í minsta lagi 30 dagar. Hesi hava rætt til tilboð um koppseting frá tí, tey hava verið í Føroyum í 14 dagar. Tilboðið er tó ikki galdandi, um mett verður, at einasta endamálið við uppihaldinum er koppseting (koppsetingarturisma). Føroyingar, ið eru undir útbúgving uttanlands, eru undantiknir kravinum um uppihald í Føroyum í 14 dagar. Tey, sum eru í hesum bólkinum og ynskja at verða koppsett, skulu melda seg til koppsetingina á korona.fo.

**Koppseta føroyingar, sum fyribils eru staddir í Danmark**
Føroyingar, sum eru staddir fyribils í Danmark, t.d. sjúklingar og avvarðandi teirra, kunnu verða koppsett ókeypis, meðan tey eru í Danmark. Tvær treytir eru ásettar í sambandi við koppsetingina í Danmark: 1) at viðkomandi er í Danmark í minsta lagi í 30 dagar. Viðkomandi kann verða koppsett/-ur, tá viðkomandi hevur verið í Danmark í 14 dagar; 2) endamálið við uppihaldinum í Danmark má ikki verða koppseting. Koppsetingin verður veitt, tá málbólkurin, sum viðkomandi hoyrir til, fær tilboð um koppseting. Tey, sum ynskja at verða koppsett, skulu venda sær til ta regiónina, har tey eru stødd. Nærri kunning hesum viðvíkjandi sæst á heimasíðuni hjá Sundhedsstyrelsen:

https://www.sst.dk/da/corona/Vaccination/Hvem-skal-vaccineres.

# Soleiðis virkar flokkimmunitetur

Tá føroyska fólkið hevur fingið flokkimmunitet ímóti koronu, er ikki longur vandi fyri ógvusligum útbrotum, har sjúkan spreiðir seg uttan tamarhald. Men flokkimmunitetur merkir tó ikki, at ongin tá kann gerast sjúkur longur.

Vit laða okkum varðar á leiðini í verjuni ímóti koronu og niðurberjingini av farsóttini. Vit merkja okkum teir rundu dagarnar, fyrst tá tíggju prosent av okkum vórðu koppsett, síðani 20 prosent, triði hvør og so framvegis. Og nú hava 50 prosent av øllum føroyingum fingið fyrsta prikið.

Tað er at frøast um, at tað hevur gingið so væl at koppseta so nógvar føroyingar, uttan at sjúkan veruliga er sloppin at fáa fastatøkur í Føroyum. Og við fáum undantøkum eru tey, sum kortini eru blivin sjúk, sloppin væl – tey eru komin væl fyri seg aftur.

Málið er tó flokkimmunitetur, sum er tann stóri varðin á leiðini. Tí tá tað málið er rokkið, missir sjúkan takið og fer so líðandi at hvørva.

Tá tað snýr seg um koronu, COVID-19, hevur verið sagt, at flokkimmunitetur er rokkin, tá 70-75 prosent av fólkinum er koppsett. Nýggj meira smittandi frábrigdi av virusinum, til dømis tað sonevnda deltafrábrigdið, hava tó fingið donsku heilsumyndugleikarnar at ivast í, um 70-75 prosent er nóg mikið. Tí hevur Sundhedsstyrelsen mælt til, at ung í aldursbólkinum 12 til 15 ár eisini verða koppsett.

**Men hugtakið flokkimmunitetur verður ofta misskilt.**
Tað liggur í orðinum, at flokkimmunitetur verjir fjøldina. Prinsippið er einfalt at skilja: Tess fleiri fólk í einum landi ella avmarkaðum øki hava andevni ímóti eini smittandi sjúku, til dømis koronu, tí tey eru koppsett ella longu hava verið sjúk, tess minni eru sannlíkindini hjá ókoppsettum fólki at renna seg í fólk, sum eru sjúk og tískil kunnu smitta.

Tá flokkimuniteturin er rokkin, eru hesi sannlíkindini vorðin so smá, at tey flestu, sum kortini verða smittað, verða frísk aftur uttan at hava smittað nakran annan. Tá doyr smittan spakuliga út. Tað kann samanberast við ein vatnbrunn, tá turkur er – tað rennur meira úr brunninum enn í hann, og tí tømist hann.

Smittan doyr tó ikki út beinanvegin, tá flokkimmuniteturin er rokkin. Og sjúkan kann vitja aftur, til dømis í sambandi við ferðing. Tí er vert at geva gætur, at flokkimmunitetur als ikki merkir, at ongin longur kann gerast sjúk/-ur. Er eitt fólk ikki koppsett ella ikki longu hevur havt koronu, so hevur tað ikki andevni ímóti sjúkuni. Tí kann tað saktans verða smittað og gerast sjúkt, sjálvt um alt fólkið samlað sæð hevur rokkið markinum fyri flokkimmuniteti.

Tað er tí skeivt at halda, at einum ikki nýtist at koppsetast, men at tað er nóg mikið bara at ansa væl eftir ikki at gerast sjúk/-ur, áðrenn fjøldin hevur fingið flokkimmunitet, tí tá fer hann at syrgja fyri hundrað prosent verju.

Tað fer hann ikki. Flokkimmuniteturin ger sannlíkindini fyri smittu minni og forðar fyri ógvusligari smittuútbreiðslu, men ert tú ókoppsett/-ur og so óheppin at koma í samband við ein, ið ber koronusmittuna, so er stórur vandi fyri at fáa koronu, sama um fólkið annars hevur flokkimmunitet.

# Eitt talgilt koronupass

Øll, sum eru koppsett, fáa í næstum eitt talgilt føroyskt koronupass. Endamálið við koronupassinum er at gera tað lættari hjá føroyingum at ferðast í onnur lond. Miðað verður eftir, at passið verður klárt at taka í nýtslu fyrst í juli 2021.

Tað gongur væl at menna talgilda loysnina, og síðani skal koronupassið góðkennast í ES. Fyri at góðkenningartilgongdin kann ganga so smidliga sum gjørligt, er tætt samskifti millum avvarðandi partar.

Sum nú er, fáa øll, sum verða koppsett, tað gula koppsetingarkortið útflýggjað á koppsetingarstøðunum. Hetta prógvið hevur allar tær neyðugu altjóða góðkenningarnar. Tað verður mælt øllum til at goyma gula koppsetingarkortið, tí í summum førum kann tað vera ein fyrimunur at hava eitt fysiskt kort at vísa á – eisini hóast tú hevur eitt talgilt prógv.

Talgilda føroyska koronupassið verður tøkt á app og á heimasíðu, og kann skrivast út. Tað kann vera hent hjá teimum, ið ikki hava snildfon.






Koppseting
COVID-19

# Hjáárin í sambandi við koppseting

Øll koppingarevni hava hjáárin, eisini Comirnaty®, koppingarevnið frá PfizerBioNThec. Yvirhøvur er talan tó um mild og stutt árin, og mett verður, at koppingarevnið er eitt sera trygt og væl dokumenterað koppingarevni.

Tey flestu fáa eitt sindur ilt um stungustaðið. Onnur vanlig hjáárin eru møði, høvuðpína, pína í liðum og vøddum, kulsingar, nakað av fepri og roði og troti um stungustaðið. Yvirhøvur eru hetta tekin um, at immunverjan virkar og ber seg at, sum hon skal. Tær nýtist ikki at ringja til lækna, um tú fært slík mild hjáárin.

Í hendinga førum kunnu koma álvarsamar bráðreaktiónir við ovurviðkvæmi, tí at kroppurin tolir ikki íblandingarevnini í Comirnaty®. Veitst tú, at tú hevur ovurviðkvæmi ímóti eitt nú heilivági, eigur tú at geva starvsfólkinum, sum koppsetir teg, boð um hetta áðrenn koppsetingina. Tá ið koppsett verður fyri COVID-19, er altíð fólk á staðnum, ið duga at handfara bráðreaktiónir við ovurviðkvæmi.

**Fráboða um illgruni er um hjáárin**

Øll COVID-19 koppsetingarevnini eru nýggj. Hetta merkir, at tey eru fevnd av skerpaðari fráboðanarskyldu. Tað vil siga, at avvarðandi heilsustarvsfólk hava skyldu til at fráboða Sundhedsstyrelsen illgruna um hjáárin (burtursæð frá illgruna um skeiva heilivágsnýtslu) hjá sjúklingum, sum tey hava í viðgerð ella hava viðgjørt. Skerpaða fráboðanarskyldan til Sundhedsstyrelsen er galdandi fyrstu 2 árini, frá tí at farið er undir at marknaðarføra koppingarevni í Danmark.

Aftaná tey fyrstu 2 árini fevnir fráboðanarskyldan um allan illgruna um álvarsom ella óvæntað hjáárin. Sundhedsstyrelsen kann í serligum førum gera av, at heilivágur (koppingarevni) skal koma undir skerpaða fráboðanarskyldu í eitt longri tíðarskeið. Hetta við atliti at savna saman meiri vitan um hjáárin í sambandi við heilivágin/koppingarevni, og fyri at skerpa eftirlitið við hjáárini. Sundhedsstyrelsen kunnger dagført yvirlit yvir heilivágssløg, sum eru undir skerpaðari fráboðanarskyldu, á heimasíðu teirra.

Avvarðandi lækni/heilsustarvsfólk ella apotekið kunnu fráboða hjáárin á www.meldenbivirkning.dk

# Føroyar samanborið við onnur lond

Sambært Our World in Data hava millum 41 og 70 % av samlaða fólkatalinum í Norðurlondunum fingið fyrru koppsetingina fyri COVID-19, í Føroyum hava 50 % av samlaða fólkatalinum fingið fyrru koppsetingina.

Niðanfyri sæst eitt yvirlit yvir, hvussu stórur partur av samlaða fólkatalinum í Norðurlondunum hava fingið minst eina koppseting fyri COVID-19.

Kelda: Our World in Data 22. juni 2021, https://ourworldindata.org/covid-vaccinations

| **% av fólkatalinum, sum eru koppsett minst einaferð** | |
|---|---|
| Ísland | 70% |
| Finnland | 57% |
| Danmark | 54% |
| Føroyar | 50% |
| Svøríki | 44% |
| Noreg | 41% |

# Kunningartilfar

**Kunningartilfar sæst á:**

- www.corona.fo, undir koppseting: https://corona.fo/203?_l=fo.
- corona.fo á Facebook
- corona.fo á Instagram
- Heimasíðuni hjá Sjúkrahúsverkinum – https://ls.fo/

**Støðulýsingar**

| | |
|---|---|
| Koppseting fyri COVID-19 – Støðulýsing 4 | 23. juni 2021 |
| Koppseting fyri COVID-19 – Støðulýsing III | 7. mai 2021 |
| Koppseting fyri COVID-19 – Støðulýsing II | 26. mars 2021 |
| Koppseting fyri COCID-19 - Støðulýsing I | 19. februar 2021 |

**Filmar**

| | |
|---|---|
| Kunning um koronukoppseting | Filmur: Nú fáa fólk 85 ár og eldri tilboð um koppseting |
| Kunning um koronukoppseting | Filmur um hvørjir bólkar fáa bjóðað koppseting fyrst |

**Tíðindaskriv**

| | |
|---|---|
| Í næstu viku kunnu øll bóka tíð til koppseting | 24.05.2021 |
| Nú kunnu útisetar og útlendingar koppsetast í Føroyum | 14.05.2021 |
| Ein knappur triðingur av samlaða fólkatalinum í Føroyum hevur fingið fyrra prikið | 11.05.2021 |
| Útisetar fáa møguleika at koppsetast í Føroyum | 02.05.2021 |
| Fimti hvør hevur fingið fyrra prikið | 25.04.2021 |
| Nú skal tann breiða fjøldin koppsetast | 22.04.2021 |
| Flest koppsettu eru kvinnur | 29.03.2021 |
| Nýggj støðulýsing um koppsetingartilgongdina | 27.03.2021 |
| Nýggj bíleggingarskipan til koppseting | 22.03.2021 |
| Fólk við fjølbreki verða koppsett næst | 04.03.2021 |
| Støðulýsing av koppsetingargongdini | 19.02.2021 |
| Annað prikið framskundað | 03.02.2021 |
| Landsstýrismaðurin fult álit á koppseting | 03.02.2021 |
| 84 prosent av føroyingum vilja koppsetast | 21.01.2021 |
| Eldri og heilsuveik verða koppsett nú | 12.01.2021 |
| Eldri og heilsuveik næst í røðini | 07.01.2021 |
| Við koppsetingini hómast endin á koronufarsóttini | 30.12.2020 |
| Vaksinan er á veg | 29.12.2020 |
| Koppseting byrjar nakrar dagar seinni enn ætlað | 23.12.2020 |
| Koppsetingin byrjar ímillum jóla og nýggjárs | 17.12.2020 |
| Koppingarætlanin handað landsstýrismanninum | 16.12.2020 |

**Koppsetingarætlanin**

| | |
|---|---|
| COVID-19 Koppingarætlan fyri Føroyar. | Heilsumálaráðið, 16. desember 2020 |

**Faldari til tey, ið verða koppsett**

| | |
|---|---|
| Koppseting fyri COVID-19 | |

# Kunngerð um COVID-19 koppseting

**Kunngerð nr. 183 frá 18. desember 2020 um ókeypis koppseting ímóti COVID-19, sum seinast broytt við kunngerð nr. 80 frá 13. mai 2021**

Við heimild í § 2, stk. 1 í løgtingslóg nr. 118 frá 12. desember 2007 um ókeypis koppseting ímóti ávísum smittandi sjúkum og § 15 í løgtingslóg nr. 104 frá 5. september 1988 um apoteksverkið og heilivág, verður ásett:

### Fevnd av tilboðnum

**§ 1.** Tilboð um ókeypis koppseting ímóti COVID-19 verður veitt persónum, fevndir av hesari kunngerð, ið eru búsitandi í Føroyum.

*Stk. 2.* Persónar, sum uppihalda sær fyribils í Føroyum í minsta lagi 30 dagar, eru eisini fevndir av tilboðnum um ókeypis koppseting sambært stk. 1. Hesi hava rætt til tilboð um koppseting frá tí, tey hava verið í Føroyum í 14 dagar. Tilboðið er tó ikki galdandi, um mett verður, at einasta endamálið við uppihaldinum er koppseting.

*Stk. 3.* Føroyingar, ið eru undir útbúgving uttanlands, eru undantiknir kravinum um uppihald í Føroyum í 14 dagar.

### Málbólkur

**§ 2.** Ókeypis koppseting ímóti COVID-19 verður veitt niðanfyristandandi bólkum:

1. Starvsfólkum í heilsugeiranum, eldrageiranum og ávísum pørtum av almannageiranum, sum hava tætt samband við sjúklingar ella búfólk og sum eru í serligum vanda fyri at verða smittað við COVID-19.
2. Búfólkum á ellisheimum og røktarheimum ella øðrum røktarbústaði.
3. Sjúklingum, sum eru í viðgerð og sum eru í serligum vanda fyri at gerast álvarsliga sjúkir, verða teir smittaðir við COVID-19. Hesir sjúklingar verða valdir út í samráð við teir sjúkrahúslæknar, sum hava ábyrgd av viðgerðini.
4. Avvarðandi at teimum sjúklingum, sum eru nevndir í nr. 3.
5. Persónum, ið hava fylt 65 ár, ið fáa persónliga røkt og hjálp við tí praktiska.
6. Persónum, ið hava fylt 85 ár.
7. Persónum í aldrinum 80-84 ár.
8. Persónum í aldrinum 75-79 ár.
9. Persónum í aldrinum 65-74 ár.
10. Persónum í aldrinum 16-64 ár.

*Stk. 2.* Um so er, at skamtur loypur av tann dag koppsett verður, kann Sjúkrahúsverkið koppseta onnur enn tey í stk. 1 nevndu bólkunum.

### Skipan

**§ 3.** Sjúkrahúsverkið hevur ábyrgdina av og skipar fyri COVID-19 koppsetingunum.

*Stk. 2.* Koppsetingarnar fara fram á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar Sjúkrahúsi, Suðuroyar Sjúkrahúsi. Sjúkrahúsverkið kann harumframt skipa koppsetingarnar á øðrum stað.

*Stk. 3.* Koppseting fyri COVID-19 og møgulig hjáárin av koppseting, verður skrásett í talgildu heilsuskipanini.

**§ 4.** (Strikað).

**§ 5.** Apoteksverk Føroya hevur koppingarevni, ið skal nýtast til koppseting ímóti COVID-19, á goymslu.

### Útreiðslur

**§ 6.** Landskassin rindar útreiðslurnar í sambandi við koppseting sambært hesi kunngerð.

### Gildiskoma

**§ 7.** Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Koppseting
COVID-19